# LEIKSKRÁ

## 6. UMFAR

7. JUNI 2020

BLAÐ NR. 04




MYND: ÁLVUR HARALDSEN

ARGJA BÓLTFELAG 1973

HAVSBRÚN

## VÆLKOMIN TIL DYST Í FLØTUGERÐI

betri DEILDIN

# Innihald

Dysturin í dag ........ 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ........ 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og AB ........ 10
Leikarin hesaferð ........ 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ........ 18
Seinasti dysturin ........ 22
ÍF-sangurin ........ 24

**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.

MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Í dag vóna vit aftur, at ÍF klárar at hála ein heimasigur í land ímóti AB av Argjum. Vórðu vónirnar fyri einum heimasigri góðar síðsta vikuskifti, so munnu tær ikki verða minni í dag.

Tó hava vit ofta havt tað torført, tá ið vit hava spælt ímóti AB. Bæði í Fløtugerði í Fuglafirði, og á Argjum. Hagtølini tala greiða talu. Tað má kempast 110% í dag, um ÍF skal koma upp á 9 stig og eisini fáa koma í gongd við ein góðan stima í landskappingini.

Tað er ikki so nógv vit kenna til útiliðið AB, tí tað er mestsum eitt nýtt lið í mun til liðið í fjør. Stór útskifting hevur verið á AB-liðnum, og tað er blivin ein vani hjá lítla felagnum av Argjum at hava stóra útskifting í hópinum. Kappingin um bestu leikararnar er sera stór ímillum feløgini í Havn, og ofta eru tað tey stóru feløgini HB og B36 sum fara avstað við størstu talentunum í høvuðstaðnum, og tí stendur felagið av Argjum við einari truplari uppgávu at gera seg galdandi í Betri-deildini.

Sum eg skilji á venjarunum, so er góður møguleiki fyri, at mestsum allir leikararnir eru tøkir til dystin ímóti AB. Fleiri leikarar hava síðstu tíðina stríðst við skaðar av ymsum slagi, men nú lýsnar í, og tað er bert onkur einstakur leikari, sum ikki er tøkur í dag.

Tað er eisini tørvur á, at ÍF hevur allar leikarar tøkar til allar dystirnar í Betri-deildini, tí breiddin er ikki stór, og eru onkrir av teimum royndu leikararunum sum ikki eru tøkir, so viknar liðið beinanvegin nakað, og kjansirnir minka at fáa stig burturúr dystunum.

Landskappingin er nú 5 umfør gomul, og nú síggja vit, at kappingin longu er mestsum knekka av í miðjuni. Tey ovastu 5 liðini, og tey 5 niðastu liðini á stigatalvuni, eru akkurát tey liðini, sum blivu spádd at liggja har tey liggja. Tað er torført at síggja, at hatta broytist innanfyri komandi árini, men man kann liva í vónini, at FSF fer at traðka til og broyta okkurt, sum kann gera mun og gera kappingina meira áhugaverda. Serliga fyri tey minnu feløgini, sum stríðast ítróttarliga og fíggjarliga.

Vinna vit ímóti AB í dag, og Víkingur tapir sín dyst í Sarpugerði ímóti B36, ja so yvirhála vit felagsliðið úr Eysturkommunu. Tað hevði verið stuttligt.

*Góðan dyst øll somul :-)*






INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399



SPEKT | løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG samskip






Fønix

Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

KELDA: FAROESOCCER

## 5. UMFAR

### Betri-deildin Menn

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 5 | 5 | 0 | 0 | 16 | 3 | 13 | 15 |
| 2 | NSÍ | 5 | 4 | 0 | 1 | 15 | 2 | 13 | 12 |
| 3 | KÍ | 5 | 4 | 0 | 1 | 15 | 4 | 11 | 12 |
| 4 | B36 | 5 | 4 | 0 | 1 | 16 | 7 | 9 | 12 |
| 5 | Víkingur | 5 | 2 | 2 | 1 | 6 | 5 | 1 | 8 |
| 6 | ÍF | 5 | 2 | 0 | 3 | 6 | 14 | -8 | 6 |
| 7 | EB/Streymur | 5 | 1 | 0 | 4 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| 8 | AB | 5 | 0 | 2 | 3 | 1 | 15 | -14 | 2 |
| 9 | TB | 5 | 0 | 1 | 4 | 3 | 10 | -7 | 1 |
| 10 | Skála | 5 | 0 | 1 | 4 | 6 | 18 | -12 | 1 |

*Niðurflytingar strikan til 1. deild*

**HETTA UMFARIÐ**

| |
|---|
| ÍF - AB |
| KÍ - NSÍ |
| TB - HB |
| EB/Streymur - Skála |
| Víkingur - B36 |

**7. UMFAR**

| |
|---|
| TB - ÍF |
| B36 - EB/Streymur |
| HB - Skála |
| KÍ - Víkingur |
| NSÍ - AB |

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Adrian **Justinussen** | (HB) | 6 |
| 2 | Jóannes **Bjartalíð** | (KÍ) | 6 |
| 3 | Klæmint A. **Olsen** | (NSÍ) | 5 |
| 4 | Uros **Stojavnoc** | (ÍF) | 5 |
| 5 | Meinhard E. **Olsen** | (B36) | 4 |
| 6 | René **Joensen** | (HB) | 4 |
| 7 | Jan **Hansen** | (Skála) | 3 |
| 8 | Michal **Przybylski** | (B36) | 3 |
| 9 | Mórits Heini **Mortensen** | (NSÍ) | 3 |
| 10 | Ole Erik **Midtskogen** | (KÍ) | 3 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Jann **Benjaminsen** | (NSÍ) | 4 |
| 2 | Petur **Knudsen** | (NSÍ) | 4 |
| 3 | Sebastian **Pringel** | (B36) | 4 |
| 4 | Filip **Djordjevic** | (ÍF) | 3 |
| 5 | Heðin **Hansen** | (HB) | 3 |
| 6 | Michal **Przybylski** | (B36) | 3 |
| 7 | Bárður **Hansen** | (NSÍ) | 2 |
| 8 | Daniel **Johansen** | (HB) | 2 |
| 9 | Heðin **Klakstein** | (Skála) | 2 |
| 10 | Mórits Heini **Mortensen** | (NSÍ) | 2 |






# 6. UMFAR

## ÍF – betri deildin – AB

| ÍF | Nr. |
|---|---|
| Tóri T. **Traðará (M)** | 1 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard (L)** | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Karl **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Hákun **Edmundsson** | 11 |
| Jákup **N. Olsen (M)** | 13 |
| Gundur E. **Petersen** | 14 |
| Bogi A. **Løkin** | 15 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Rói **Róin** | 19 |
| Jóhan **Petersen** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 |
| Milos **Budakovic (M)** | 25 |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. |

LIÐLEIÐARAR: TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG

FYSIO: HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

| Nr. | AB |
|---|---|
| 1 | Silas **Eyðsteinsson (M)** |
| 4 | Asbjørn **Heðinsson** |
| 5 | Ragnar **Rasmussen** |
| 6 | Gert O. S. **Drangastein** |
| 7 | Jasper **van der Heyden** |
| 8 | Janus S. **Samuelsen** |
| 9 | Tóki **á Lofti** |
| 10 | Bjarni **Skála** |
| 11 | Hans Jákup **Annfinnsson** |
| 13 | Jónas **Stenberg** |
| 14 | Tróndur **á Høvdanum** |
| 16 | Heðin **Stenberg (M)** |
| 17 | Bartal S. **Petersen** |
| 18 | Jákup Pauli **Breckmann** |
| 19 | Sørin N. **Samuelsen (L)** |
| 20 | Filip **í Liða** |
| 21 | Rógvi N. **Poulsen** |
| 22 | Bjarki C. **Nielsen** |
| 23 | Ragnar **Skála** |
| 24 | Jón K. **Poulsen** |
| 25 | Bjarki V. **Mørk (M)** |
| 27 | Rógvi **Skála** |
| 30 | Adeshina A. **Laeal** |
| VENJARI | Símun **Samuelsen** |
| VENJARI | Tonn **Brimsvík** |
| HJÁLPARVENJ. | Rógvi N. **Poulsen** |
| MÁLMANSVENJ. | Heðin **Stenberg** |

FYSIO: LÍV D. MICHELSEN

LIÐLEIÐARAR: EYÐUN DALSGARÐ, MARTIN B. DALSGARÐ OG KÁRI SKÁLA

| | |
|---|---|
| DÓMARI | Bjarki **Danielsen** |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Edvard **Højgaard** / 2. Jón Marni **Johannesen** |
| 4. DÓMARI | Petur **Reinert** |
| EYGLEIÐARI | Jónfinn **Olsen** |

BÓLTSTUÐUL: HANS VILHELM ANTHONIUSSEN




MOWI

FAROE ISLANDS

RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka.
Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks.
Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO


Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP


Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo


Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

LEIKARIN

# 7 DÁNJAL á LAKJUNI

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ:

**Navn:** Dánjal á Lakjuni .
**Føðingardagur:** 22.09.1990.
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Stjóri í egnari fyritøku, MultiPutl.
**Pláss á vøllinum:** Vongur.
**Yvirtrúgv:** Havi onga.
**3 orð sum lýsa teg:** Arbeiðsamur, Positivur,
**Torførasti mótstøðumaður:** Jannik Vestergaard.
**Frítíðarítriv:** Havi einki.
**Vónir fyri 2020:** Topp 6.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** 21.10.2008 ímóti B68.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 5 ára gamal.
**Aðrar ítróttargreinar:** Flogbólt, badminton og fimleik.
**Minningarríkasti dystur:** Síðsti dystur í 2010, tá vit vunnu 3-1 ímóti Víkingi í Gøtu.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Tað man nokk verða beiggjarnir og Ragnhard Petersen, sum var ungdómsvenjari hjá okkum.
**Besti fótbóltsleikari:** Messi.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Tennis.

**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Venjing við bólti.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Renning uttan bólt.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Pizza og cola.
**Slag av tónleiki:** Poppur.
**Sjónvarpssending:** 3-2.
**At slappa av:** Verða saman við familjuni.

## TROYGGJA NR.: 7

**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Messi/Ronaldo.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Andy Olsen.
**Besta bók/blað:** Babylon RIsing – The first will be last hjá Rob Shiba.
**Stuttligasti persónur:** Heri Simonsen.
**Stuttligasti í hópinum:** Milan Svoji.
**Besti ÍF áskoðari:** Eyðun á Lakjuni.




## FAKTA UM PÓL JÁKUP

Hevur ment sokallaða „Høgna á Lakjuni-fintuna“ til eitt nýtt støð.

Í 2007 leikti Dánjal við LÍF, har navnframir menn, umframt Bárður á Lakjuni, sum Andreas Lava Olsen og Sølvi Vatnhamar eisini leiktu við.

Í tíðarskeiðinum 2008-2012, hevur Dánjal verði partur av U19 og U21 landsliðunum.


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111




A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
ESAB
FROZEN
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## 2. UMFAR

### Betri-deildin Kvinnur

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 4 | 2 | 2 | 6 |
| 2 | NSÍ | 2 | 1 | 1 | 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 3 | B36 | 2 | 1 | 1 | 0 | 4 | 1 | 3 | 4 |
| 4 | HB | 2 | 0 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 5 | EBS/Skála | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 | 4 | -4 | 1 |
| 6 | ÍVB | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 5 | -4 | 0 |

**HETTA UMFAR**
7. juni 2020

| |
|---|
| ÍVB - EBS/Skála |
| HB - B36 |
| KÍ - NSÍ |

**KOMANDI UMFAR**
14. juni 2020

| |
|---|
| HB - ÍVB |
| KÍ - EBS/Skála |
| NSÍ - B36 |

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Bára **Magnussen** | (B36) | 2 |
| 2 | Unn **Hvidbro** | (NSÍ) | 2 |
| 3 | Evy **á Lakjuni** | (KÍ) | 1 |
| 4 | Eyðvør **Klakstein** | (KÍ) | 1 |
| 5 | Hanna **Højgaard** | (ÍVB) | 1 |
| 6 | Hansina **Ronaldsdóttir** | (NSÍ) | 1 |
| 7 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 1 |
| 8 | Jónvá **Hentze** | (HB) | 1 |
| 9 | Olga Kristina **Hansen** | (B36) | 1 |
| 10 | Sunniva **Willemoes** | (HB) | 1 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Evy **á Lakjuni** | (KÍ) | 2 |
| 2 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 2 |
| 3 | Emma **Hansdóttir** | (B36) | 1 |
| 4 | Ester **Ellingsgaard** | (B36) | 1 |
| 5 | Jensa **Tórolvsdóttir** | (ÍVB) | 1 |
| 6 | Julia Naomi **Mortensen** | (HB) | 1 |
| 7 | Lena **Olsen** | (NSÍ) | 1 |
| 8 | Sanna **Svarvadal** | (KÍ) | 1 |
| 9 | Sara **Lamhauge** | (HB) | 1 |
| 10 | | | |



**Bilasølan**

Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo

.com/bilasolan .com/bilasolan



**Leiðandi reiðarí**
í norðurhøvum




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

**Vit takka fyri stuðulin**

multiputl
Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …
tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo



5. UMFAR

TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ. MYND: PALLI VANG

# ÍF-EB/Streymur





UNDANFARNA UMFAR

**Endiliga, ja endiliga kundu vit aftur fegnast um ein heimasigur til okkara røsku dreingir, tá ið ÍF vann 2-1 á EB-Streymur 2. hvítusunnudag 1.juni.**

Fyri fyrstu ferð síðani 24.august 2017 vann ÍF ein heimadyst í bestu deildini. Tá bleiv tað til ein flottan 2-1 sigur á HB, sum annars er eitt av heilt sterku liðunum í Betri-deildini.

Eg varð til dystin í Fløtugerði síðsta mánakvøld. Lat meg siga beinanvegin, at tá ið eg fór niðan at hyggja eftir dystinum, væntaði eg, at ÍF fór at vinna og harvið fáa 3 kærkomin stig.

Dysturin varð eitt sindur rótutur frá byrjan av, og tað varð útiliðið EB/Streymur, sum fekk tveir góðar kjansir innanfyri teir fyrstu 5-10 minuttirnar. Varð hepnið við teimum, so høvdu teir lagt seg framum tá. Men tíbetur kom heimaliðið í gongd, og tá ið 21 minuttir vórðu farnir, skoraði Filip Djordjevic sítt fyrsta mál í landskappingini í ár.

Filip vísti annars ein góðan vilja allan dystin, og tað letur til, at hann heilt sikkurt kann gerast ein leiðari og lyklaleikari fyri ÍF-liðið í ár. Gott at síggja ein relativa ungan mann vísa slíkan vilja og orku.

Liðini hildu fram at vísa rótut spæl, og tá ið 45 minuttir vóru farnir, fóru liðini til hálvleiks, og óiva vónaðu áskoðarnir ein betri spældan seinna hálvleik. Soleiðis skuldi tað tó ikki verða.

Tað bleiv hildið fram við at spæla eitt sindur ping-pong í seinna hálvleiki. Eftir 66 minuttir kom tó ein glotti av góðum vilja og góðum evnum. Hetta varð tó frá áleyparanum Niklas Kruse hjá EB/Streymur. Niklas skoraði eitt sera gott mál, tá ið hann flott og smart trekti framvið tveimum verjuspælarum hjá ÍF. Hann legði bóltin eftir jørð í handara horn, og harvið varð støðan 1-1.

Nú mundu heimaáskoðararnir vóna, at ÍF veruliga fór at seta EB/Streymur undir trýst, og tað riggaði partvís. Tó varð tað ikki fyrrenn eftir 87 minuttum, at sigursmálið kom. Enn eina ferð ferð varð tað vandamikli Uros Stojanov sum skoraði. Áleyparin hevur nú skora 5 mál eftir 5 umførum. Sera góð byrjan av serbanum í ÍF-álopinum. Løtu seinni floytaði dómarin dystin av, og fyri fyrstu ferð í langa tíð kundu vit heimaáskoðarar fara av Fløtugerði við einum heimasigri í skjáttuni.

Sera týdningarmikil heimasigur má sigast.

Nú er okkara lið komið uppá 6 stig eftir 5 dystir. Í kappingini í fjør høvdu vit 6 stig eftir 27 dystir. Lat okkum trúgva uppá, at vit hava eitt hampuliga gott lið í ár, og at ÍF endar nakað væl longur frammi á stigatalvuni, tá ið kappingiun endar í november/desember, í mun til í fjør. Tað eigur at lata seg gera.

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

**TAKKAR FYRI STUÐULIN**